# Kakao-flis frá **Jógvan Weihe** til urtagarðin

**Jógvan Weihe hevur útgerð til urtagarðin, millum annað kakao-flis, ið heldur sniglarnar burtur og sum í mangar mátar er gott fyri urtagarðin**

**HANDIL**
**Dagfinn Olsen**
dagfinn@sosialurin.fo




P/F Jógvan Weihe selur útgerð til m.a. arbeiðsklæðir, frítíðarútgerð til eittnú camping og frítíðarfiskimenn og alt innan urtagarðsrøkt.

### Kakkao-flis

Innan urtagarðsrøkt hevur fyritækan nú kakao-flis at bjóða, og er hetta flis, ið er framleitt av kakaobønum, ið eisini verða nýttar í t.d. fraleiðslu av sukurlátu. Við nýtslu av kakako-flis sleppur ein undan at nýta kemsik evni.

Ein stórur fyrimunur við kakao-flis er, at hetta heldur sniglum burtur, tí teir trívast ikki í kakao-flis.

Kako-flis er gott fyri urtagarðin, tá ið ein vandar kemur ein skorpa á, ið verjur spírar og fræ, og sum eisini forðar fyri, at flisið fer avstað við vindinum.

### Fyritøkan

P/F Jógvan Weihe varð stovnað í 1991. Hetta var í ringastu tíð, meðan samfelagskreppan herjaði. Tað vóru tey bæði Hildubjørg og Jógvan Weihe sum stovnaðu fyritøkuna.

Jógvan er útbúgvin skrivstovumaður. Hann byrjaði í Landshandlinum í Havn í 1960, og frá 1963 arbeiddi hann sum ferðandi sølumaður hjá Landshandlinum. Hann arbeiddi eisini sum ferðandi sølumaður á heilsøluni hjá Kartni Winther.

Jógvan hevur eisini ferðast nógv kring landið fyri sína egnu fyritøku, og er hann helst tann føroyingurin, sum hevur arbeitt longst sum ferðandi sølumaður.

Fyritøkan selur so gott sum allar vørur sum t.d. fiskireiðskap til frítíðarfiskimenn, og alt til urtagarðsrøkt. Tá morðsnigilin byrjaði at gera um seg í Føroyum, vóru tey t.d. fyrst við Ferramol, sum hevur bøtt munandi um hendan snigilstrupulleikan. Sum nakað nýtt selur fyritøkan nú eisini arbeiðsklæðir, oljuklæðir, stivlar og annað til arbeiðs- og fiskimenn.

1/1-09 yvirtóku synirnir hjá Jógvani fyritøkuna.

Handilin er opin gerandisdagar frá kl. 8.00-17.30 og leygardag frá 9.00-13.00.










